## Dystaryvirlit

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 13.05 | B36-Skála | Jens Petur Brattalíð |
| 13.05 | KÍ-GÍ | Petur Reinert |
| 13.05 | NSÍ-AB | Rúni Gaardbo |
| 13.05 | VB/S-B71 | Eiler Rasmussen |
| 14.05 | HB-EB/S | Dagfinn Olsen |

| 1. deild menn | | |
|---|---|---|
| 12.05 | LÍF-SÍ | Jan Skoradal |
| 12.05 | TB-ÍF | Páll Augustinussen |
| 12.05 | HB-B68 | Høgni Hansen |
| 12.05 | FSV04-NSÍ | Bárður Mortensen |
| 12.05 | B36-KÍ | Andrew Christiansen |

| 2. deild menn | | |
|---|---|---|
| 13.05 | EB/S-Skála | Marner Olsen |
| 13.05 | MB-GÍ | Andrass Weihe |
| 13.05 | KÍ-B68 | Jan Gardar |
| 13.05 | FSV04-ÍF | MB |
| 13.05 | B36-Fram | Jóhan P. Michelsen |

| 1. deild kvinnur | | |
|---|---|---|
| 13.05 | KÍ-AB | Hagbard Joensen |
| 13.05 | B36-EB/S | Rói Jacobsen |
| 13.05 | NSÍ-GÍ | Alex Troleis |

VB/Sumba – B71:

# Skerdir suðuroyingar móti

**Birgir Jørgensen er leikbannaður. Magnus Tausen er leikbannaður, og tað sama er Birni Kjærbo. Dyggur smeitur hjá liðnum, sum hevur tapt sjey dystir á rað og liggur aftast í deildini. Tí er tað ein uggi, at Evrard Ble er við aftur, tá sterku sandoyingarnir, sum hava allar mans tøkar, vitja sunnudagin**

UPPTAKT
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Ársins fyrsta landskappingardyst vann VB/Sumba á uppflytarunum AB. 1-0 var úrslitið og málið gjørdi Jón Krosslá Poulsen.

– Hetta er besta byrjanin, vit hava fingið í fimm ár, segði fegni málskjúttin, Jón Krosslá Poulsen, sum eisini staðfesti týdningin av at fáa stig. Síðani hevur VB/Sumba ikki fingið eitt einasta stig aftrat, og tað harmar Jón Krosslá Poulsen.

– Tað er øgiliga strævið og menn skeldast lætt í slíkum støðum, tá tað ikki sær so gott út, sigur ársins fyrsti málskjútti hjá VB/Sumba í ár.

### Felagslið fyri alla oynna

VB/Sumba hevur bara skotið seks mál í ár og hevur latið 23 ígjøgnum. Teir eru liðið, sum hevur skorað fæst mál, men og latið flest ígjøgnum, og hetta hevur fingið fólk at tosa.

– Fólk tosa meiri og meiri um eitt lið fyri alla Suðuroynna. Vit liggja sjálvir í botninum á Formuladeildini, og næstbesta liðið í oynni liggur á fimta plássi í 1. deild. Hetta er ikki nóg gott, og sjálvur haldi eg bara tað hevði verið positivt, um alt varð lagt saman í eitt lið, tí so nógv fólk hava vit heldur ikki at taka av í oynni, metir Jón Krosslá Poulsen.

### Ikki mist móti

Men fyribils má Jón Krosslá Poulsen og restin av liðnum hjá VB/Sumba fyrihalda seg til beiska veruleikan um, at teir liggja aftast í deildini. Hetta kann tó síggja øðrvísi út, tá vikuskiftið er av.

– Ja, tað er heilt víst, at vit fara eftir øllum trimum stigunum. Trý stig er eitt krav, tað er einki sum eitur. Tað mugu vit fáa, og vit merkja eisini trýst frá øllum síðum, sigur hann, sum slær fast, at teir á ongan hátt hava mist móti á liðnum.

– Vit hava ovmikið at kempa fyri, og tað er nógv eftir at landskappingini enn, vísir Jón Krosslá Poulsen

Optimisman livir sostatt enn í hópinum, men tað kemur dátt við hjá teimum, at tríggir leikarar hava fingið leikbann.

Birgir Jørgensen, Martin Tausen og Birni Kjærbo fingu allir sítt fimta gula kort í ár móti EB/Streymi og mugu tí sita yvir hetta vikuskiftið.

– Men Evrard Ble hevur vant í vikuni, og verður við í hópinum sunnudagin. Tað er eitt øgiligt pluss fyri okkum, sigur Jón Krosslá Poulsen, sum bæði vónar og væntar, at teir vinna á B71 sunnudagin.

### B71 roynir altíð at vinna

Men tað ætlar B71 so sanniliga eisini.

– Nú vil eg ikki ljóða hástórur, men eg haldi vit royna at vinna hvønn dyst, vit spæla, sigur Eli Hentze hjá B71 og heldur áfram.

– Eg haldi eisini, at vit í tí stóra og heila kunnu vera hampiliga vælnøgdir. Tann einasti dysturin, sum hevur verið fullkomiliga miseydnaður, var tann á Skála, sigur hann.

### Avskrivaðir av øllum

B71 tapti fyrsta dystin í ár.




## Við – ikki við

| | | |
|---|---|---|
| B36 | Ivasamur: | Mikkjal Thomassen |
| | Við aftur: | Arnhold Berg tøkur |
| KÍ | Leikbann: | Símun Joensen og Oddmar á Lakjuni |
| | Skaddur: | Julian Samuelsen |
| | Ivasamir: | Erling Fles og Kaj Ennigarð |
| GÍ | Skaddur: | Hans Jørgen Djurhuus |
| | Ivasamur: | Atli Gregersen |
| NSÍ | Ivasamur: | Pól Thorsteinsson og Anderson |

# EB/Streymur

Tað er ofta so, at hagtølini hava hug at spæla við á vøllinum, hóast gomul tøl í prinsippinum ikki hava tað stóru ávirkanina á, hvussu leikur fer í ávísum dysti. Og hóast ein trendur í hagtølunum kann vera trupult at bróta, so eydnaðist hetta so dyggiliga hjá EB/Streymi í fjør. Undan 2006 høvdu teir nevnliga als ikki skorað móti HB í Gundadali, men við fýra stigum av seks møguligum brutur teir upp úr nýggjum í so máta. Tað mundi heldur ikki gera støðuna verri, at EB/Streymu eisini var liðið, sum sendi HB úr steypakappingini, tá hesir loksins sluppu at spæla. Hinvegin kundi HB ugga seg við FM-gullinum, og tað var nú heldur so galin troyst. Talvan sýnir, hvussu tað hevur gingist, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava dystast í tilsvarandi dystunum seinastu 10 árini.

**-mørk**